ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

26. mai 2015
Mál: 13/00312-33
Viðgjørt: Heri Petersen

**(Uppskot til)**
**Kunngerð um broyting í kunngerð um fíggjarligt frípláss**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 88 frá 17. juni 2009 um fíggjarligt frípláss, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
“**§ 1.** Fult fíggjarligt frípláss kann játtast eftir dagstovnalógini § 6a, stk. 2, um inntøkugrundarlagið er 253.300 kr. ella lægri.
*Stk.2.* Fyri 2015 er galdandi, at fyri hvørjar 800 kr. inntøkugrundarlagið er hægri enn 254.100 kr., lækkar fríplássið við 1%.
*Stk.3.* Fyri 2016 er galdandi, at fyri hvørjar 1150 kr. inntøkugrundarlagið er hægri enn 254.450 kr., lækkar fríplássið við 1%.
*Stk.4.* Fyri 2017 er galdandi, at fyri hvørjar 1500 kr. inntøkugrundarlagið er hægri enn 254.800 kr., lækkar fríplássið við 1%.
*Stk.5.* Fyri inntøkur frá 253.300 kr. til og við 254.100 kr. verður veitt 95% frípláss.
*Stk.6.* Fyri inntøkur frá 253.300 kr. til og við 254.450 kr. verður veitt 95% frípláss.
*Stk.7.* Fyri inntøkur frá 253.300 kr. til og við 254.800 kr. verður veitt 95% frípláss.
*Stk.8.* Inntøkumarkið sambært stk.1 - 4 verður á hvørjum ári, javnað við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.
*Stk.9.* Landsstýrismaðurin kunnger á hvørjum árið, í seinasta lagi 1.juni, í rundskrivi eina útrokningartalvu, sum vísir inntøkumarkið fyri fíggjarligum fríplássi, og hvussu nógv fíggjarligt frípláss kann játtast tí ávísa inntøkugrundarlagnum.”

2) Í § 3, stk. 1 verða nr. 3 og 4 strikað. Nr. 5-9 verða eftir hetta nr. 3-7.

3) § 3, stk. 4 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 4.* Tá inntøkugrundarlagið verður uppgjørt, skulu ikki skattafríar inntøkur sambært stk. 1, nr. 2-5 upproknast soleiðis, at tær samsvara við skattskylduga inntøku, og síðani leggjast afturat skattskyldugu inntøkuni.”

4) Í § 3 verða sum stk. 5, 6 og 7 sett:
“*Stk. 5.* Er skattskylduga inntøkan 65.000 kr. ella hægri, verður funnið fram til inntøkugrundarlagið við at leggja afturat skattskyldugu inntøkuni eina upphædd samsvarandi við skattafríu inntøkuna faldað við 1,83.
*Stk. 6.* Er skattskylduga inntøkan lægri enn 65.000 kr. verður fyrst funnið fram til samlaða nettoinntøkugrundarlagið, og síðani verður inntøkugrundarlagið funnið við at upproknað samlaða nettoinntøkugrundarlagið til skattskylduga inntøku. Samlaða nettoinntøkugrundarlagið verður roknað soleiðis:
   1) Er skattskylduga inntøkan hægri enn 30.000 kr., men lægri enn 65.000 kr.,

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 354046 • E-mail: amr@amr.fo

er samlaða nettoinntøkugrundarlagið nettoinntøkan umframt 75% av skattskyldugu inntøkuni umframt 6.300 kr.

2) Er skattskylduga inntøkan 30.000 kr. ella lægri er samlaða nettoinntøkugrundarlagið netto-inntøkan umframt 96% av skattskyldugu inntøkuni.

*Stk. 7.* Samlaða nettoinntøkugrundarlagið sbrt. stk. 6 verður upproknað til skattskylduga inntøku soleiðis:

1) Er nettoinntøkugrundarlagið 28.750 kr. ella minni verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,04.
2) Er nettoinntøkugrundarlagið størri enn 28.750 kr., men minni enn 54.900 kr., verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,34 og síðani verður 8.500 drigið frá.
3) Er nettoinntøkugrundarlagið 54.900 kr. ella meiri verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,83 og síðani verður 35.400 kr. drigið frá."

**§ 2**

*Stk.1* Henda kunngerð kemur í gildi 1.august 2015.
*Stk.2.* § 1, stk.3 og 6 kemur í gildi 1.august 2016.
*Stk.3.* § 1, stk.4 og 7 kemur í gildi 1.august 2017.